# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Hans Erik Djurhuus 80 ár



Hósdagin 17. juli verður Hans Erik Djurhuus í Søldarfirði 80 ár.

Hans Erik er føddur í Byrgi í Søldarfirði, sonur Hansinu, f. Solmunde, og Sámal Erik Djurhuus, sum sjeynda barn av tólv. Hann giftist í 1951 við Klaru, dóttir Miu og Petur Weihe í Søldarfirði. Tey eiga trý børn: Marita, Petur Eirik og Kára. Í 1959 fluttu tey í egin hús í Søldarfirði.

Sum heilt ungur var hann húskallur hjá Wilhelm Reinert í Havn. Tá ið hann var seytjan ára gamal fór hann til skips. Vetrarnar 1954/55 og 1955/56 var hann á sjómansskúlanum, har hann tók skiparaprógv og longdina. Eftir hetta var hann sjómaður í nøkur ár, mest sum stýrimaður.

Saman við sváginum Hans Alberg yvirtók í 1959 hann handilsvirkið hjá verfaðirinum, og hevur handilsyrkið verið lívsstarv hansara. Handilin hevði opið til 1994.

Hóast hann ikki hevur starvast á sjónum síðani seinast í fimmti-árunum, er ein partur av frítíðini farin umborð á báti. Til fyri nøkrum árum síðani hevur hann havt bát, og hevur honum dámt væl bæði at vera á floti og at royna eftir sild við gørnum.

Kristnitrúgvin liggur honum nær, og hevur hann í nógv ár, saman við Klaru, verið millum berandi kreftirnar í missiónshúsinum, seinni bønhúsinum, í Søldarfirði, bæði til lestur, møti og sunnudagsskúla. Í nógv ár hevur hann eisini verið við í blákrossarbeiði, og var hann eisini formaður í staðbundna blákrossfelagnum í nógv ár.

Nú hann gerst áttati ára gamal eigur hann, umframt trý børn, tíggju abbabørn og átta langabbabørn.

## Andlát og jarðarferðir

**Jógvan Olsen** frá Skála andaðist mánadagin, 86 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Bergtóra Vágsheyg Niclasen** úr Klaksvík, vanliga nevnd Begga hjá Jógvan Segl, andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi týsdagin, 90 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum fríggjadagin klokkan 18.00. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin klokkan 14.00.




## Fyrsta kirkju-konsertin hjá Lenu Andersen



*Lena og Niclas bergtóku áhoyrararnar í Miðvágs kirkju*

Sunnudagin 13. juli var kirkjan í Miðvági fullsett á Vestanstevnu eins og á jólum, tá Lena, Niclas og Flóin undirhildu.

Henda konsertin var tann fyrsta kirkjukonsertin hjá Lenu, og sigast skal, at tey komu sera væl frá henni. Væl kenda altartalvan við Jesusi á krossinum riggaði serstakliga væl sum bakgrund til teir lívsjáttandi og jaligu sangirnar hjá Lenu. Okkurt tárið mundi renna úr eygnakrókunum, tá hon við síni mildu rødd sang um at síggja tað góða, sum lívið, hvønn dag lærir menniskju, sjálvt um onkrir dagar miseydnast. Lena streyk gittarstreingjunum so varliga, at hjartastreingirnir hjá áhoyrarunum fylgdu við. Áhoyrararnir fingu eina ógloymandi uppliving. Miðvágs kirkja vísti seg eisini at verða sera væl egnaður karmur.

Framførslan hjá Lenu var ein blandingur av nýggjum og væl kendum løgum. Lena sang eisini á føroyskum, og sang hon tá »Tú og eg, vit klára tað«, sum maður hennara Niclas hevur yrkt.

**Orð og mynd:**
**Mikkjal N. J. Olsen**



Leygardagin 19. juli hava hjúnini Morid og Gunnleivur Mouritsen, í Havn, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd gullbrúdleypsdagin.